# Kaos.fo



*Elin Christiansen úr Havn er kvinnan handan nýggju føroysku mótasíðuna kaos.fo. Elin er útbúgvin »Designteknolog«, ið snýr seg um móta og stíl, og lesur nú »Multimediadesign«, sum m.a. snýr seg um at gera heimasíður.* ***Kaos.fo*** *er ein føroyskur mótabloggur, ið vísir nýggjasta rákið*

So var hann her! Tann føroyski mótabloggurin, har tú kanst lesa alt um mótan bæði heima í Føroyum og uttanlands. Kaos.fo tekur pulsin á gøtuni, men eisini á alheims mótasýningum. Harumframt er møguleiki hjá brúkarunum at gera viðmerkingar og samskifta um móta

Ein mótabloggur á føroyskum máli, við føroyskum sjónarhorni og við eftirnavninum ".fo" er nú vorðin veruleiki.

Slíkir mótaportalar eru sera vanligir uttanlands, og at hyggja á tílíkar mótasíður er ein nógv nýttur háttur at leita sær íblástur og góð ráð. Ofta eru eisini bloggar tilknýttir, og fólk kunnu soleiðis samskifta um hvat hendir innan mótaheimin – og ofta við einum stuttligum undirtóna.

Onkur føroyingur stendur handan onkran líknandi blogg, men **kaos.fo** er tann fyrsti heilføroyski mótabloggurin, og tað er Elin Christiansen úr Havn, sum stendur handan síðuna.

## Alt um móta

Á kaos.fo ber til at síggja og lesa um **Catwalk**, har skrivað verður um sniðgevar. Til ber at lesa um bæði teir heilt stóru, men eisini smærri sniðgevar, sum eru á veg fram. Tá stóru mótasýningarnar verða á skránni, verður sjálvsagt eisini ein hópur av myndum frá mótasýningum kring allan heim lagdar út her.

Til ber at klikkja seg inn á **Íblástur**, har myndir, tekstir ella annað kunnu geva íblástur til ein ávísan stíl.

Ein leinkja eitur **Copycat**, og har sæst, hvussu tú sjálv kanst gera tey pløgg, sum tú mást hava. Her fært tú góð ráð um, hvussu tú kanst spara hópin av peningi við at leita kreativu síðuna fram og samstundis klæða teg í tað nýggjasta nýggja.

Til ber eisini at fara inn á **Gøtan**, har myndir av vanligum fólki við sermerktum stíli eru at síggja. kaos.fo fer at vera nógv úti við myndatólinum bæði í Føroyum og uttanlands, og